## Enn langt á mál

Barack Obama, forseti, vann ein týðandi sigur, tá Umboðsmannatingið um vikuskiftið samtykti uppskot hansara um at nýskipan á heilsuøkinum. Tað eru eygleiðarar á einum máli um, men teir eru eisini samdir um, at enn er langt á mál. Danski USA-serfrøðingurin Niels Bjerre Poulsen sigur við DR, at Senatið fer at venda uppskotinum fleiri ferðir, áðrenn tað fær tær neyðugu 60 atkvøðurnar har. Sjálvur heldur hann, at uppskotið hevur betri møguleikar í Senatinum, eftir at Umboðsmannatingið hevur broytt tað, soleiðis at tað almenna skal ikki rinda útreiðslur til fosturtøku.



## ST hartar Svøríki

ST og fleiri aðrir felagsskapir fýlast á, at svensku myndugleikarnir gera ov lítið fyri at verja teir ymsu minnilutarnar í landinum, og tí hava umboð fyri svensku stjórnina fingið boð um at koma til eina hoyring í Geneve næsta vár. Tey atfinningarsomu vísa millum annað á, at í 2007 skrásettu svensku myndugleikarnir 155 álop á fólk úr etniskum minnilutum, men at bara fimm av málunum endaðu í rættinum. Tey halda eisini, at teir svensku politikararnir eiga at banna rasistiskum felagsskapum.

# SEV vil hækka elprísin við 4 oyrum um árið

**SEV er í løtuni í holt við at leggja fíggjarætlan fyri komandi ár, og í hesum sambandi hava samráðingar leingi verið millum leiðsluna í SEV og elveitingareftirlitið um møguleikan at hækka streymprísin, so elfelagið betri gerst ført fyri at røkka málinum um, at 75% av streymnýtsluni á landi í 2020 skal koma frá varandi orkukeldum**

SEV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá elfelagið SEV fer at hava aðalfund hin 20. november, skal fíggjarætlanin fyri 2010 fyriliggja.

Í fjør søkti SEV um loyvi at hækka elprísin við 4 oyrum fyri hvønn kilowattíma, men elveitingareftirlitið sýtti felagnum hesa hækking.

Nú nýggj fíggjarætlan fyri 2010 skal leggjast, hevur felagið ikki formelt søkt um loyvi at hækka streymprísin, men Páll á Reynatúgvu, formaður í SEV-stýrinum, sigur, at leiðslan í elfelagnum hevur verið á fleiri samráðingarfundum við elveitingareftirlitið.

- Millum tey mál, sum vit hava viðgjørt, er ein hækking í streymprísinum., ásannar hann.

Elveitingareftirlitið er lutfalsliga nýtt. Eftirlitið varð skipað eftir nýggju elveitingarlógini, og formaður í eftirlitinum er stjórin í Fjarskiftiseftirlitinum, Jógvan Thomsen.

Páll dylur ikki fyri, at SEV aftur í ár hevur eitt ynski um, at elprísurin hækkar, og felagið vónar, at tað fundarvirksemi, sum hevur verið millum leiðsluna í felagnum og elveitingareftirlitið, hevur skapt forstáilsi fyri ynsktu hækkingini í streymprísunum.

### Kostar pening

SEV-stýrisformaðurin sigur, at skulu Føroyar liva upp til málið, vit hava sett okkum, at 75% av elnýtsluni á landi skal koma frá varandi orkukeldum í ár 2020, krevur hetta stórar íløgur og stórar útbyggingar, bæði innan vatn, vind, alduorku og vónandi eisini sjóvarfallsorku.

Páll á Reynatúgvu vísir á, at tað er nógv bíligari at útbyggja við termiskari orku, sum eru motorar og olja enn at byggja út við varandi orkukeldum.

- Hinvegin vita vit øll, at oljan fer at gerast dýrari, og vit vita eisini, at termisk orka dálkar okkara umhvørvi og okkara heim.

Hann vísir á, at líkamikið, um vit í størri mun enn í dag leggja okkum eftir varandi orkukeldum – ella vit leggja okkum eftir at útbyggja við termiskari orku, fer elprísurin at hækka.

- Tað er kostnaðarmikið at byggja út við varandi orkukeldum, og vit vita eisini, at oljuprísirnir fara at hækka aftur, tó at vit ikki vita nær. Allur heimurin veit, at elprísirnir fara ikki at lækka, men hækka, leggur hann aftrat.

### Miljardaíløga

Páll á Reynatúgvu væntar, at íløgurnar, sum elfelagið noyðist at gera fram til ár 2020, um vit skulu røkka málinum um tey 75%, sum eru sett út í kortið, verða umleið 1,2 miljardir krónur.

- Vit hava tí ynski um, at elprísurin kann hækka við 4 oyrum um árið, so møguleikar verða at røkka hesum máli, sigur SEV-stýrisformaðurin.



*- Líkamikið, um vit í størri mun enn í dag leggja okkum eftir varandi orkukeldum – ella vit leggja okkum eftir at útbyggja termisku orkuna, fer streymprísurin at hækka.. Allur heimurin veit, at elprísirnir fara ikki at lækka, men hækka, sigur Páll á Reynatúgvu, formaður í SEV-stýrinum*

# Jógvan roynir seg aftur í Grand Prix

**Nú er greitt, at Jógvan Hansen, sum júst nú er fløguaktuellur, skal framføra eitt lag hjá Bubbi Mortens til íslendska Melodi Grand Prixið. Hetta verður sostatt aðru ferð, at Jógvan Hansen er við í íslendska Melodi Grand Prix'num**

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Jógvan Hansen sigur hetta verða eitt hæddarpunktunum í tónleikalívi hansara. Hann hevur altíð lurtað nógv eftir Bubbi Mortens, og sær tí hetta sum ein stóran heiður.

- Eg hevið verið býttasti maður í Íslandi og Føroyum, um eg ikki takkaði ja til hendan møguleikan, sigur Jógvan Hansen við Vísir.

Eisini Bubbi Mortens er glaður fyri, at tað verður Jógvan Hansen, ið skal framføra lag hansara. Hann sigur við Fréttablaðið, at Jógvan er ein góður tónleikari, syngur væl í øllum sjangrum, og er ógvuliga nærverandi á pallinum.

Enn er ikki greitt, hvørt lagið skal framførast á enskum ella á íslendskum, men Bubbi Mortens hevur altíð verið framsøgumaður fyri, at íslendskir tónleikarar framføra á móðurmáli sínum til Íslendska Melodi Grand Prixi, og tískil er væntandi, at Jógvan eisini fylgir ynskunum hjá Bubbi.

Jógvan Hansen er júst nú fløguaktuellur, og fløga hansara »Vinaløg«, sum hann hevur gjørt saman við íslendska Friðriki Ómar, er ógvuliga væl móttikin í Føroyum og Íslandi, og fløgan liggur nú nummar eitt á íslendska sølulistanum. Jógvan Hansen verður eisini at hoyra í Føroyum seinni í ár, tá hann fer at framføra til ársins Planet Awards.